

**Johan Norðfoss:**

# Skutu eftir íslendsku sjóverjuni

**Johan fer við Vestland 10. mai 1940 og er við árið út. Skiparin »den røde djævel« er ein harður hálsur, sum ikki bakkar fyri at skjóta eftir íslendsku sjóverjuni. Eisini er Johan við til jarðarferðina hjá fyrrverandi bretska forsætismálaráðharranum Neville Chamberlain**



**Óli Jacobsen**
olij@sosialurin.fo

**5. partur**

So fara vit aftur til Íslands, har vit royndu ymsa staðni. Vit byrjaðu á Selvogsbankanum. Sum árið leið fóru vit norður eystanfyri og síðan upp í Húnaflóðan á Norðurlandinum. Skiparin var nú ein dugnaligur maður. Hann hevði einki kort yvir Húnaflóðan, og her var sera óreint. Vit hildu útkikk frammi á bógnum, og skuldu hyggja eftir hvar tað breyt. So sigldi hann inn ímillum, tað gekk væl. Vit lógu har og snurraðu, men fingu einki og høvdu góðan hug at koma inn um mark at fiska.

Men so tann eina dagin legði fýrurin á. Vit koma heilt inn í hendan fjørðin. Her var so trongt, at vit kundu ikki seta snurrivoddið tvørtur um, tí tað var ov smalt. Vit settu tað út og inn. Vit fiskaðu fyrst ein dag, her var bara tari í. Næsta dag var tað sama. Vit skákaði eitt sindur, og triðja dagin, tá skuldi tú sæð. Reyðsprøkurnar vóru so stórar, at tað gingu bert 14 í kurvina og kurvin tekur 70 pund. Reyðsprøka heldur sær frægast, og tí varð altíð roynt eftir reyðsprøku fyrra partin á túrinum og hýsu seinna partin.

Danirnir høvdu sera stóran ans fyri góðsku. Vit høvdu fýra hyllar í lastini, so ikki ov nógv trýst skuldu vera á fiskinum, meðan føroysk skip høvdu eina hyll. Fiskurin var væl reinsaður og væl vaskaður. Ísin høvdu vit við úr Grimsby.

Hetta sást eisini aftur á prísinum vit fingu, tí fiskurin var sera vakur og góður.

Annars var ikki nóg mikið av ísi at fáa hjá føroyskum skipum. Dømi er um, at teir tóku ís av vøtnunum sum til dømis Vágsvatni. Tá munnu vetrarnir hava verið kaldari enn nú!

Báturin tók 600 kitt, sum var vekteindin, tá landað var í Grimsby. Eitt kitt er um 60 kg.

Vit fingu 100 kurvar av hesi stóru reyðsprøkuni, sum sá so gott út. Tá so túrurin byrjaði at halla setti hann hýsuvoddið undir. Síðan var hýsa fiskað, meðan toskur varð blakaður út aftur. Tað var hýsa og reyðsprøka, sum fekk besta prísin á marknaðinum ta tíðina.

Nautiska útgerðin var eingin. Vit høvdu ikki so frægt sum eitt ekkolodd, men hetta var ikki nøkur forðing. Inntøkan var góð. Eg forvann kr 5.500 fyri árið 1940. Eg fekk ráð at keypa eitt radio frá Tummas Jakku, radiohandlinum á Bryggjubakka, merkið var »His masters voice«. Hetta var seinasta Marconi radio hann seldi við automatiskum eyga. Tað kostaði 500 kr, men var eisini tað vert. Vit høvdu tað fram til 1965.

### Skutu eftir íslendsku sjóverjuni

Tá hendi einaferð, at íslendingar komu eftir okkum, tí vit fiskaðu langt innanfyri mark inni í Húnaflóðanum.

Vit vóru inni á fjørðin við Sauðarkróki. Tá komu íslendingar út eftir okkum. Tað var ein motorbátur við fleiri monnum í. Teir gjørdu vrøvl, tí vit fiskaðu innanfyri mark. Vit lógu innanfyri Grettisoyggj. Tá gjørdi gamli bart. Hann hevði sínar royndir frá herinum og dugdi at fáast við eina maskinbyrsu. Hann gav boð um at taka maskinbyrsuna fram. Hon var annars ætlað sum ein verja móti týskum álopum. Hann rópti so á íslendingarnar á donskum og bað teir skrubba av, annars skuldu teir fáa av at vita. Hetta var ikki bert hóttan. Hann byrjaði so at skjóta. Teir vóru nokk so nær okkum. Hetta var ein bátur sum var eini 20-30 tons.

Menninir kavaðu niður av dekkinum, meðan neistarokið stóð um teir. Teir vóru skjótir at sleppa sær til rýmingar. Vit fingu frið eftir hetta, og lógu einar 2-3 dagar afturat og fyltu skipið við hýsu.

Vit fóru so til Fleetwood. Har suðuri á leiðini var eitt sindur ringt at sigla, tí tað var so útgrunt.

Komnir til Fleetwood fór skiparin í land. Her var ikki so strangt við eftirliti, tí tað var sjáldan, at nakað merktist til kríggið.

Men har var kortini ein kemikaliufabrikk nakað tætt við, og hon kundi vera eitt týskt bumbumál. Tað mátti tí myrkaleggjast væl og virðiliga, so tað ikki sást minsta ljós. Sóu teir nakað ljós varð skotið eftir tí.

Vit lógu gjarna inni einar átta dagar hvørja ferð. Vit seldu væl. Fiskurin hjá okkum hevði so gott orð á sær, at hann var næstan



*Vestland fiskaði við hesa oynna. Men freistingin at fara inn um var stór, hóast tað var innan fyri mark. Og teir fóru….*



*Soleiðis sá dekkið á einum snurriváðskipi út*